## Geir til Írlands



Í næstu viku fer íslendski forsætisráðharrin Geir H. Haarde til Írlands á almenna vitjan saman við konu síni, Ingu Jónu Þórðardóttur. Tað er írska stjórnin, sum hevur boðið teimum til Dublin. Sambært írska blaðnum The Irish Times skal Geir H. Haarde hava fund við írska forsætisráðharran, Bertie Ahern, og írska forsetan, Mary McAleese. Samstundis sum Geir H. Haarde fer til Írlands, er forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, boðin til USA.

## Færri fólk um flogvøllin

Í august ferðaðust 24.962 fólk um flogvøllin Vágum, og tað var 2,3 prosent minni enn í sama mánað í fjør. Sostatt var ferðafólkatalið minni bæði í juli og august enn somu mánaðir í 2006, men kortini er talið størri higartil í ár enn um somu tíð í fjør. Vøksturin er 5,2 prosent. Higartil í ár hava 154.536 fólk ferðast um flogvøllin í Vágum.

# Sendistovan letur upp

**Leygardagin í næstu viku letur føroyska sendistovan í Reykjavík upp**

SENDISTOVA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin í komandi viku fer leiguflogfar úr Føroyum til Íslands við innbodnum gestum í sambandi við, at føroyska sendistovan í Reykjavík letur upp.

Umframt hálvtannaðhundrað innbodnar íslendingar eru eisini 80 føroyingar bodnir at verða við til hátíðarhaldið. Fleiri tiltøk verða fyriskipað í hesum sambandi, og tað fyrsta verður móttøka fyri innbodnum í Býráðssalinum í Reykjavík. Hendan varar frá 15.00 til 16.30.

Hálvan tíma seinni verður opið hús í hølunum hjá Sendistovu Føroya í Austurstræti 12. Øll eru vælkomin, og sagt verður av løgmansskrivstovuni, at tey í hesum sambandi hava lýsingar í íslendsku bløðunum, so øll áhugað fáa høvið at støkka inn á gólvið.

Kvøldið endar við konsert í glassalinum í Norrønu Húsunum í Reykjavík, har Budam, Jógvan Hansen og Jensina Olsen.

Framsýningin »Náturligvís« verður samstundis sýnd í Norrønu Húsunum í Reykjavík.

Sagt verur av løgmansskrivstovuni, at innbodnu gestirnir sjálvir rinda fyri ferð og uppihald, sum eisini verður neyðugt, tí komið verður ikki til Føroya aftur fyrr enn sunnudagin.



*Gunnvør Balle byrjar í nýggja yrki sínum sum sendikvinna Føroya í Íslandi leygardagin*

# Einki øki funnið – enn

**Tað er rætt, at trupulleikar vóru við ruskinum í Porkeri í fjør, men tað komst av verkfalli. Hinvegin er rætt, at tað hevur tikið tíð at finna eitt nøktandi øki at goyma ruskbingjunum, sigur Eli Frederiksen, borgarstjóri**

BINGJUPLÁSS
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur tikið sína tíð hjá Porkeris kommunu at finna eitt hóskiligt pláss at hava ruskbingjurnar standandi. Og enn er eingin endalig loysn funnin, men Eli Frederiksen, borgarstjóri, sigur, at nú sær út til, at ein loysn er í eygsjón.

- Tað má jú verða rímiliga høgligt hjá fólki at sleppa til, og uttan at kunna geva vissu fyri tí vænti eg, at ein loysn verður funnin innan alt ov langa tíð, sigur Eli Frederiksen.

Onkur hevur hug at fílast á, at ruskbingjurnar sum er standa á keiøkinum, og Eli Frederiksen viðgongur, at tað vóru trupulleikar eitt tíðarskeið í fjør.

- Men hetta komst av verkfalli, so tað bar ikki til hjá IRF at heinta ruskið. Síðani tá hevur einki verið at merkt til hvørki lukt ella annað, sigur borgarstjórin í Porkeri.

Hetta, at bæði seyður, fuglur og rottur gera sær dælt í ruskdungunum og dragsa í eyst og vest, vísir Eli Frederiksen aftur.

Bingjurnar eru afturlætnar, so eingi kríatúr sleppa fram at ruskinum. Bingjurnar til óbrennbart standa enntá undir lási. Haraftrat royna vit altíð at halda plássið so reint og ruddiligt sum gjørligt, so tað skuldi eingin trupulleii verið av økinum, sigur Eli Frederiksen, sum tó viðgongur fyrr at hava lovað, at fáa ruskplássið flutt til eitt betur hóskandi øki.



*Ruskbingjjurnar í Porkeri standa enn á keiøkinum. Men ein loysn er í eygsjón, sambært borgarstjóranum*